UTTAN ÚR HEIMI

# Hann hóttir Vesturheimin



*Indonesisku myndugleikarnir halda, at hetta er asiatiski yvirgangsleiðarin Noordin M. Top.*

*Mynd: Reuters*

**+Asiatiska deildin hjá al-Qaeda hóttir USA, Bretland, Italia og Avstralia við yvirgangi**

YVBIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

- Vit endurtaka, at Amerika, Avstralia, Bretland og Italia eru okkara fíggindar. Tit skulu vita, at so leingi tit royna at leggja Irak og Afghanistan undir tykkum, skulu tit fáa sviðan av okkara yvirgangi.

Boðskapurin var greiður á sjónbandsupptøkuni, sum indonesiska sjónvarpið Metro TV sendi í gjár. Einki varð sagt um, hvør maðurin á bandinum var, men indonesiski varaforsetin, Jusuf Kalla, vildi vera við, at talan var um Noordin M. Top. Hann er ættaður úr Malaysia og verður hildin at vera ein av teimum ovastu leiðarunum í asiatiska yvirgangsfelagsskapinum Jemaah Islamiah, sum er tann asiatiska deildin av al-Qaeda.

Hetta ver fyrstu ferð, at ein sjónbandsupptøka av hesum slagnum er komin undan kavi í Indonesia, og avstralsku myndugleikarnir vóru eisini skjótir at siga frá, at teir taka hóttanina í størsta álvara. Alexander Downer, uttanríkisráðharri, segði við Reuter, at hóttanin er álvarssom, men at landi kortini ikki letur seg ræða av einum so víðgongdum sum Noordin M. Top.

Á bandinum verða øll, sum styðja George W. Bush og Tony Blair ávarað.

- Vit skulu minna allar stuðlar hjá Bush og Blair á, at eisini teir eru okkara fíggindar, og teir eru eisini okkara álopsmál, sigur maðurin á sjónbandinum.

Indonesiska løgreglan sigur, at sjónbandið varð funnið í einum húsum miðskeiðis á oynni Java í síðstu viku, og at , og at Noordin M. Top hevði leigað húsini. Undir átakinum skutu løgreglumenninir yvirgangsmannin Azahari bin Husin. Indonesisku myndugleikarnir vilja vera við, at tað vóru hann og Noordin M. Top, sum skipaðu fyri bumbuatsóknini á Bali í 2002, ið kravdi 202 mannalív. Hildið verður, at tað vóru eisini teir, sum skipaðu fyri atsóknini at avstralsku sendistovuni í Jakarta í fjør, og sum kravdi 10 mannalív.

# Fortíðin fekk hann aftur

**Ein 20 ára gomul umsókn kann forkoma møguleikanum hjá Samuel Alito at gerast dómari í amerikanska hægstarætti**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

George W. Bush, forseti, hevur havt ilt við at manna tann seinasta tóma sessin í hægstarætti, og tað er heldur ikki líkt til, at hansara seinasta evni sleppur ígjøgnum nálareygað. Í øllum førum verður tað trupult.

Hesaferð hevur Bush skotið upp at velja dómaran Samuel Alito í hægstarætt, men í sambandi við tilnevningina er ein umsókn, sum Alito skrivaði fyri 20 árum síðani, komin undan kavi. Ta ferðina søkti hann eitt løgfrøðistarv í umsitingini hjá Ronald Reagan, forseta. Har skrivaði hann millum annað, at eftir hansara meting hava amerikanskar kvinnur ikki krav upp á fosturtøku.

Samuel Alito fekk starvið, sum hann søkti tá, men nú kann innihaldið í umsókníni forkoma møguleikum hansara at gerast dómari í hægstarætti, skrivar AP. Stuðlar hansara vísa á, at umsóknin er 20 ára gomul, og at innihaldið tí ikki eigur at skaða møguleikar hansara í dag. Men tey, sum eru ímóti, at hann verður tilnevndur, siga, at innihaldið júst staðfestir løgfrøðiligu hugsjónirnar hjá honum, og at tær eru óhóskandi fyri ein hægstarættardómara.

Senatið skal í januar taka støðu til, um Samuel Alito er egnaður at vera dómari í hægstarætti.

## Bush undir trýsti

Amerikanski forsetin, George W. Bush, gerst alsamt meiri kroystur á tí politiska heimavøllinum av krígnum í Irak, og støðugt fleiri av hansara egnu floksfeløgum venda sær ímóti politikki hansara.

Tað seinasta dømið kom fyrradagin, tá fleiri republikanskir senatorar atkvøddu fyri einum uppskoti, sum biður stjórnina fara undir at leggja afturtøkuna úr Irak til rættis á ein slíkan hátt, at USA kann taka sínar hermenn úr landinum næsta ár. Upprunaliga høvdu demokratarnir skotið upp at áleggja stjórnini at áseta ein dag fyri, nær USA skal taka sínar hermenn úr Irak. Tað vildu republikanarárnir ikki, men teir gingu tó við til at biðja stjórnina taka hermenninar heim næsta ár.

Samtyktin í Senatinum kemur Bush, forseta illa við, skrivar AP úr Washington, sjálvt um nakrir av teimum republikonsku senatorunum vóru skjótir at gera vart við, at samtyktin er ikki ein atfinning ímóti forsetanum. Eftir teirra tykki skal samtyktin tulkast sum eitt krav til irakar um, at teir nú taka við ábyrgdini av landsins trygd.

Eygleiðarar í Washington siga, at fleiri av teimum republikonsku senatorunum eru undir trýsti í sínum egnu statum. Næsta ár skulu fleiri sæti í Senatinum veljast av nýggjum, og fleiri republikanskir senatorar stúra fyri, at kríggið í Irak kann kosta teimum sætið í Senatinum. Meiri enn 2.000 amerikanarar eru falnir í Irak, og tað leggur trýst á nógvar republikanskar senatorar, skrivar AP.

## Heryvirmaður fríkendur

Ein hernaðardómstólur í Ísrael hevur fríkent ein heryvirmann, sum var ákærdur fyri at hava skotið eina 13 ára gamla palestinska gentu.

Sambært foreldrunum var Iyman Hams á veg í skúla, tá ísraelskir hermenn skutu hana nærhendis einari eftirlitsstøð uttan fyri flóttafólkaleguna Rafah í oktober í fjør. Palestinsku læknarnir, sum kannaðu líkið, søgdu, at minst 15 ísraelskar kúlur høvdu rakt hana. Hermenninir greiddu frá, at teir skutu eftir gentuni, tí teir vóru bangnir fyri, at hon hevði eina bumbu uppi á sær.

Aftan á tilburðin var yvirmaðurin hjá hermonnunum ákærdur fyri at hava skotið gentuna tvær ferðir, eftir at hon var deyð. Tað er ólógligt. Hann varð eisini ákærdur fyri at hava forðað myndugleikunum at kanna málið og fyri at vera farin út um sínar heimildir, men hernaðardómstólurin vísti øllum ákærunum aftur og fríkendi yvirmannin.

## Rættarmál aftur útsett

Fyri 21. ferð hevur krígsbrotsmannadómstólurin í Haag útsett rættarmálið ímóti fyrrverandi jugoslaviska forsetanum Slobodan Molisevic. Tað er aftur heilsan hjá Milosevic, sum svíkir, og hesaferð sigst hann hava høvuðpínu og pínu í nakkanum, skrivar Ritzau.

Læknar úr Russalandi, Fraklandi og Serbia hava kannað Milosevic, og teir siga, at hann skal binda frið í hálvan annan mánað.

Rættarmálið ímóti fyrrverandi jugoslaviska forsetanum byrjaði í 2002.

## Bjarnirnar hava tað ov gott

Náttúrufólk fegnast um, at grizzly-bjarnirnar í Yellowstone Park í USA hava tað so gott, at tær eru farnar at nørast, men nú er líkt til, at tær hava tað ov gott.

Grizzly-bjarnirnar í Yellowstone Park eru friðaðar, tí vandi var fyri, at tær fóru at doyggja út. Nú eru tær einar 600 í tali, og tí halda myndugleikarnir ikki, at tær eiga at vera friðaðar longur.

Yellowstone Park er í statunum Wyoming, Idaho og Montana. Verður friðingin sett úr gildi, eru tað myndugleikarnir í teimum trimum statunum, sum gera av, at bjarnirnar framvegis skulu friðast. Náttúrufelagsskapir bera ótta fyri, at statirnir fara at loyva fólki at veiða tær, og at grizzly-bjarnirnar so aftur koma í vanda fyri at doyggja út.